# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*»Eitt álop á Sýrialand er eitt álop á muslimska heimin«*

*iranski forsetin*

# Eldur í Beirut



*Tað logaði nógvastaðni í Beirut aftan á ísraelsku bumbuálopini í nátt.*

**Ísraelsku álopini á Libanon halda fram. Iran ávarar Ísrael ímóti at víðka álopið.**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Aftur í morgun bumbaðu ísraelsk flogfør floghavnina í Beirut, samstundis sum onnur flogfør bumbaðu samskiftisstøðir hjá libanska telefoonverkinum, orkuverk, oljugoymslur og týðandi vegir. Í nátt bumbaði ísraelska flogvápnið støðir hjá Hizbollah í Beirut og nærhendis ísraelska markinum, eftir at Hizbollah hevði skotið fleiri rakettir eftir málum í Haifa.

Í morgun tveittu ísraelsk flogfør fleiri bumbur eftir høvuðsvegnum millum Beirut og sýriska høvuðsstaðin Damaskus, og flogfør søktu eisini at støðum hjá Hizbollah har eysturi í Libanon.

Eygleiðarar siga, at hetta er fyrstu ferð, at Ísrael hevur søkt at málum so tætt við sýriska markið, og teir halda, at álopini eru ætlað sum ein ávaring til Sýrialand, ið er trúgvur stuðul hjá Hizbollah.

Tað var kanska eisini het-ta, sum fekk iranska forsetan, Mahmoud Ahmadinejad, at ávara Ísrael ímóti at víðka álopið. Sambært iranska útvarpinum hevur Ahmadinejad tosað við sýriska forsetan, Bashar al-Assad, og vissað hann um, at Iran fer at hjálpa Sýrialandi, verður landið álopið.

-Leypa ísraelsmenn á Sýrialand, er tað tað sama sum at leypa á allan tann muslimska heimin, og vit fara at svara einum tílíkum álopi harðliga, skal Ahmadinejad hava sagt.

### Iran aftanfyri?

Summir eygleiðarar siga, at tað er ikki óhugsandi, at tað var Iran, sum gav Hamas og Hizbollah boð um at burturflyta teir tríggjar ísraelsku hermenninar. Tað hóvaði ikki iranska stýrinum, at Hamas og Fatah vóru farin at nærkast einari semju um eitt komandi palestinskt ríki undir liðini á Ísrael, og at Mahmoud Abbas, forseti, og Ehud Olmert, forsætisráðharri, samdust um at taka samráðingarnar uppaftur.

Amerikanska blaðið New York Times skrivar, at Iran styðjaði avgerðina at burturflyta ein ísraelskan hermann í Gaza, og at tað er lítil ivi um, at landið eisini tók undir við avgerðini hjá Hizbollah at burturflyta tveir aðrar ísraelskar hermenn við libanska markið. Blaðið vísir á, at Iran fíggjar ein stóran part av virkseminum hjá Hizbollah í Libanon, og at Damaskus virkar sum millumliður í hesum samstarvinum.

# Irak vil sleppa at revsa amerikanskar hermenn

**Men tað fáa iraksku myndugleikarnir neyvan loyvi til.**

IRAK

*Árni Joensen: fartekst@mail.dk*

Eftir einari ST-samtykt frá 2004 hava iraksku myndugleikarnir ikki loyvi til at revsa amerikanskar ella aðrar útlendskar hermenn, sum bróta irakska lóg. Men hetta vilja irakar ikki góðtaka longur.

Í næsta mánað fer irakska stjórnin at biðja ST ógilda ta tvey ára gomlu samtyktina. Wigdan Michael, sum er irakskur ráðharri í mannarættindaviðurskiftum, sigur við Reuters, at amerikanska herleiðslan í Irak fer ov lætt um lógarbrotini hjá hermonnunum, og tað ger, at hermenninir halda seg kunna bróta iraksku lógirnar uttan at verða revsaðir.

Irakar eru serliga skelkaðir av tilburðinum, tá ein amerikanskur hermaður neyðtók og myrdi eina 14 ára gamla gentu í Mahmudiya sunnan fyri Bagdad. Síðani skutu amerikonsku hermenninir eina seks ára gamla systir gentuna og foreldur hennara.

Diplomatar á ST-høvuðsborgini í New York vænta ikki, at ST fer at ógilda samtyktina, sum forðar iraksku myndugleikunum at revsa útlendskar hermenn. Teir siga, at USA fer undir ongum umstøðum at góðtaka eina slíka broyting, og við sýtingarrættinum í trygdarráðnum kann landið forða broytingini.

## Andstøðuleiðari settur í fongsul

Í Hvítarusslandi hevur dómsvaldið gjørt av, at andstøðuleiðarin Aleksander Kozulin skal sita í fongsli tey næstu fimm árini.

Aleksander Kozulin stillaði upp á hvítarussiska forsetavalinum, men mátti lúta fyri Alekdander Lukasjenko, forseta, ið sambært valnevndini fekk 83 prosent av atkvøðunum. Kozulin sýtti fyri at viðurkenna úrslitið, og vesturlendskir valeygleiðarar vóru eisini á einum máli um, at valið var ikki rættvíst.

Nú hevur Kozulin fingið resvingina fyri at mótmæla valúrslitinum. Hann skal sita fimm ár í fongsli. Familja hansara sigur við AP, at hann fer at skjóta dómin inn fyri hægri rætt.

Aleksander Kozulin er ikki tann fyrsti andstøðupolitikarin í Hvítarusslandi, sum verður koyrdur í fongsul, og Lukasjenko, forseti, verður ofta umrøddur sum tann seinasti einaræðisharrin í Evropa.

## Stevna Cheney

Fyrrverandi CIA-agenturin Valerie Plane og maður hennara hava nú lagt sak ímóti amerikanska varaforsetanum, Dick Cheney, tí tey vilja vera við, at tað var hann, sum avdúkaði, at Valerie Plane var loyniligur agentur hjá fregnartænastuni. Tólv onnur eru stevnd í sama máli.

Valerie Plane er gift við amerikanska diplomatinum Joseph Wilson. Í 2002 avdúkaði hann, at Hvítu Húsini høvdu sagt ósatt, tá tey vildu vera við, at Irak hevði keypt ríkað uran úr afrikanska landinum Niger. Stutt eftir skrivaðu amerikonsk bløð, at kona diplomatin arbeiddi sum loyniligur agentur hjá CIA.

Tað er ólógligt at avdúka agentar hjá CIA, og málið vakti stóran ans. Undir kanningum kom fram, at tað var onkur, sum hevði tilknýti til Hvítu Húsini, sum hevði avdúkað Valerie Plane. Nú skulu Dick Cheney, fyrrverandi starvsfólkaleiðarin í Hvítu Húsunum, Lewis Libby, og ráðgevin Karl Plame fyri rættin, skrivar AP úr Washington.




*Dick Cheney skal í rættin.*

## Pinochet seldi rúsevni

Ein fyrrverandi leiðari í fregnartænastuni í Kili vil vera við, at gamli einaræðisharrin Augusto Pinochet vann nógvar pengar burtur úr at selja rúsevnið kokain til USA og Evropa.

Manuel Comteras hevur undir avhoyring í rættinum í Santiago greitt frá, at Pinochet fekk 26 milliónir dollarar burtur úr rúsevnahandli, sum sonur forsetans stóð fyri miðskeiðis í áttatiárunum.

Fyrrverandi fregnartænastuleiðarin situr í fongsli, eftir at hann bleiv dømdur fyri brot á mannarættindini. Hann hevur greitt frá, at Pinochet gav herinum boð um at byggja eina rannsóknarstovu til rúsevni í býnum Talagante, sum er einar 40 kilometrar í útsynning úr Santiago. Haðani bleiv kokainið smuglað til USA og Evropa, og pengarnar fjaldi Pinochet í útlendskum bankum.